VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag og leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 7 og 11 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fyrst gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinni lot av ymsum ættum. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin;
Mánadagin lot av ymsum ættum og ælingur, men týsdagin upp í stívt andøvsgul av norði og ælingur, partvíst vátakavi. Hitin millum 1 og 5 stig.

Matur er mentan

At ferðast í fremmandum londum kann hava fleiri endamál. Summi fara at hvíla seg og brúnka kroppsskinnið. Onnur hava áhuga í at síggja og læra, hvussu fólkið livir aðrastaðni. Tá er eitt gott hugskot at byrja við matinum, tey eta

FERÐING
Edvard Joensen

Tann sum ferðast í fremmandum londum, ger tað ivaleyst í størstan munnfyri at sleppa at síggja og royna okkurt nýtt. Summi falla so væl til, at tey venda aftur ár um ár. Tá eru tey at kalla ikki fremmandafólk meira og hava uppgivið ævintýrhugin. Hetta at uppliva og merkja tað, sum hini hava at bjóða.

Ein góður máti at koma í samband við fremmandar mentanir, er at royna matin hjá teimum, tú vitjar. Tað er jú ein partur av mentan teirra, og helst tann parturin, lættastur er at koma í samband við.

Í vikuni vórðu ferðavinnufólk úr Italia á Hotel Føroyum og søgdu áhugaðum føroyingum frá landslutinum Umbria í MiðItalia, har millum annað býurin Perugia liggur. Tað er har, Atlantsflog fer at flúgva í summar. Tiltakið var fingið í lag í samstarvi við Atlantsflog. Nógv varð á tiltakinum á Hotel Føroyum gjørt burtur úr lokala matinum, teir fremmandu høvdu við sær.

Perugia liggur í mentanarvøgguni í MiðItalia, har mætir listamenn og rithøvundar hava sín uppruna. Eisini eru kendir kirkjumenn ættaðir úr økinum. Eitt nú er grannabýur Perugia tann kendi Assisi, hvørs kendasta býarbarn ivaleyst er hin heilagi Frans, sum pílagímar í túsundatali árliga koma til býin at minnast.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷10
Nuuk	÷2
Qaqortoq	1
Ammassalik	0
Saint John's	6
Halifax	3
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	8
Lerwick	8
Aberdeen	6
London	17
Tromsø	0
Bergen	12
Oslo	–
Stokkhólm	11
Keypmannah.	12
Helsinki	÷1
Moskva	÷5
Berlin	12
Warzawa	11
Kiev	7
Bukarest	12
Paris	16
Madrid	9
Róm	11
Malorca	17
Athen	10
Malta	15
Tunis	20
Beijing	14
New Dehli	34
Bangkok	34
Jakarta	32
Sydney	28
New York	6
Miami	23
Los Angeles	18
Meksikobýur	14
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Hvarvið fer eystureftir og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 981 hPa. í útsynning úr Írlandi stendur mestsum í stað og grynnist.

Lágtrýstið sunnan fyri Írlandi fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 31/03 kl. 06⁰⁰– 01/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 31/03 kl. 06⁰⁰–01/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 92,7 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

27. mars: Mánin longst frá jørðini
29. mars: Fyrra kvarter
5. apríl: Fullmáni
8. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
2. apr	05.25	17.46	04.25	16.46	04.40	17.01	07.25	19.46	08.25	20.46	03.40	16.01	02.40	15.01	05.40	18.01	06.40	19.01	05.10	17.31	06.25	18.46
3. apr	06.07	18.28	05.07	17.28	05.22	17.43	08.07	20.28	09.07	21.28	04.22	16.43	03.22	15.43	06.22	18.43	07.22	19.43	05.52	18.13	07.07	19.28
4. apr	06.49	19.10	05.49	18.10	06.04	18.25	08.49	21.10	09.49	22.10	05.04	17.25	04.04	16.25	07.04	19.25	08.04	20.25	06.34	18.55	07.49	20.10
5. apr	07.24	19.45	06.24	18.45	06.39	19.00	09.24	21.45	10.24	22.45	05.39	18.00	04.39	17.00	07.39	20.00	08.39	21.00	07.09	19.30	08.24	20.45

5 707265 100050 >